# STÓRUR 10 kr. MARKNAÐUR AV METURVØRUM

Vit rudda tað gamla lagrið út, hópin av meturvørum einans 10 kr. pr. metur.

Vit hava fingið nógv nýtt

Toy til tann føroyska búnan hava vit eisini

SONJA DESIGN Stoffalág 41 • 100 Tórshavn • Tel. 314979











# Útibarnagarðurin

## Fjallafípan í Klaksvík søkir eftir námsfrøðingum og hjálparfólki

Í samband við at barnatalið í Útibarnagarðinum Fjallafípuni verður økt, verður søkt eftir námsfrøðingum og hjálparfólki.

- 1 námsfrøðingi at byrja 15 mars 40 tímar um vikuna, 1 námsfrøðingi at byrja 1. apríl ella eftir avtalu 30 tímar um vikuna
- 2 hjálparfólkum at byrja 1. apríl 30 tímar um vikuna.

**Í okkara dagliga arbeiði leggja vit m.a. stóran dent á:**

- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn, soleiðis at tey ekkaleys kunnu fara til arbeiðis og vita sær, at børnini eru í góðum hondum
- at vit seta okkum inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- at skapa fjølbroyttar menningarmøguleikar í einum kreativum umhvørvi
- at hava gott foreldra- og starvsfólkasamstarv

Útibarnagarðurin Fjallafípan er ein kommunalur stovnur, sum liggur í einum sera náttúruríkum og avbjóðandi umhvørvi tætt við haga og fjøru.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi 7. mars.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

**Útibarnagarðurin Fjallafípan**
v/ Jóhannu Vest
FO-700 Klaksvík · tlf. 458415


# Sosialurin

Lesið Sosialin – tað loysir seg




VINNUHÚSIÐ
House of Industry

# Skeið í byggijura

Um nóg nógv tekna seg skipa Arkitektafelag Føroya, Føroya Verkfrøðingafelag, Føroya Byggifrøðingafelag, Byggiharrasamtak Føroya og Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag fyri skeiði í byggijura.

Skeiðið er ætlað handverksmeistarum, teknikarum, byggifrøðingum, verkfrøðingum, arkitektum, løgfrøðingum og banka- og sparikassafólkum, sum fáast við bygging.

**Innihaldið á skeiðnum**
Á skeiðnum verður undirvíst í løgtingslógini um útbjóðing v.m. og í avtalugrundarlagnum millum byggiharrar og arbeiðstakarar ABF 92.

**Á skránni eru m.a. hesi evnir:**

- Avtalugrundarlagið
- Trygdir og trygging
- Útinning av enterprisuni
- Gjaldskyldan hjá Byggiharrum
- Tíðarfreistleingjan og seinkan
- Handan av arbeiðnum
- Manglum

**Undirvísari**
Undirvísari á skeiðnum verður Peter Andersen frá Håndværksrådet.

**Skeiðstaður og kostnaður**
Skeiðið verður á Hotel Norð tann 3. og 4. apríl 2003. Kostnaðurin fyri at luttaka er kr. 3500,- fyri hvønn íroknað vistarhald.

**Tilmeldingarfreist & -stað**
Freistin at tekna seg til skeiðið er **14. mars 2003** í Vinnuhúsinum á tlf. 311864 ella á teldupostadressu: industry@industry.fo

# Skrivstovulærlingur

Til skrivstovu okkara sóknast vit eftir einum røskum skrivstovulærlingi.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og krevjandi starv sum gevur tær nógvar møguleikar at royna alt tað tú hevur lært á FHS ella á HH.

**Arbeiðið umfatar millum annað:**

- vanliga kundatænastu
- at bóka debitorar/kreditorar
- at fakturera
- at røkja debitorar
- og alt annað vanligt skrivstovuarbeiði

Tú hevur FHS ella HH prógv og stórur fyrimunur er um tú hevur góðan førleika at arbeiða á teldu.

Send umsókn og avrit av prógvum tínum til okkara.

Bliðar heilsur

**P/F Thomas Dam Ítróttur og Damfar Heilsøla**
Niels Finsensgøta 5
110 Tórshavn

*Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er fyrisiting av persónsupplýsingarlógini*

*Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum vísir til Løgmálaráðið.*

*Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum fevnir um.*

*Dagliga virksemi hjá Dátueftirlitinum verður røkt av avgreiðsluskrivstovuni. Ráðið, sum landsstýrismaðurin setir, er skipað við formanni og 2 øðrum limum..*

*Eftirlitið hevur av sínum eintingum ella eftir klagu frá einum skrásettum eftirlit við, at øll viðgerð, sum lógin fevnir um, bert fer fram í samsvari við lógina..*

*Av øðrum uppgávum kann nevnast vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum viðvíkjandi skráseting og víðarigeving av persónsupplýsingum, viðgerð av klagum og málum, sum ráðið av sínum eintingum hevur tikið upp, og viðgerð av fráboðanum og umsóknum um loyvir.*

*Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum hjá almennum myndugleikum og hjá privatum.*

*Dátueftirlitið skal geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum og annars virka fyri góðum dátuviðgerðarsiði.*

# Fulltrúi til Dátueftirlitið

Við hesum verður søkt eftir fulltrúa til skrivstovuna hjá Dátueftirlitinum.

**Uppgávur**
Viðkomandi hevur dagligu leiðsluna og ábyrgdina av Dátueftirlitinum. Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna um málsviðgerð, vegleiðing og ráðgeving, fundarfyrireiking og luttøku á ráðsfundum, umframt kunnandi virksemi herundir dagføring av heimasíðuni við kunnandi tilfari og gera ársfrágreiðing.

**Fakligt førleikakrøv**
Viðkomandi skal vera útbúgvin løgfrøðingur.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Viðkomandi skal hava hug og evni at arbeiða sjálvstøðugt og evni skrivliga at málbera seg lýtaleyst á føroyskum. Kunnleika til edv á vanligum brúkarastøði krevst.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Turið D. Hentze, forkvinnu í dáturáðnum tlf. 311460 fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Dátueftirlitinum
Tinganes
Postboks 64
110 Tórshavn

og skulu vera Dátueftirlitinum í hendi í seinasta lagi 14. mars 2003.

# Sumbiar kommuna

TIl dagrøktina í Sumbiar kommunu verður søkt eftir dagrøktara at byrja beinanvegin.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Sumbiar kommunu.

Umsóknirnar skulu verða Sumbiar kommunu í hendi í seinasta lagi 7. mars 2003.

**Sumbiar Kommuna**
FO-970 Sumba
Tlf. +298 370344

# ÚTBJÓÐING

Í sambandi við bygging av **Eldrasambýli fyri Gøtu Kommunu** verður hervið boðið út alment:

**Betong- og kloakkarbeiði**

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til Teknistovuna í Gøtu frá 27. februar við at gjalda kr. 1000,- í veðhaldi á konto 6460-1657404 í Føroya Banka í seinasta lagi 4. mars.

Lisitatiónin verður týsdagin 18. mars kl. 15[00] á kommunuskrivstovuni í Gøtu.

**sp/f Teknistovan**
v. Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen ráðg. Byggifrøðingar
FO-510 Gøta
tel: 44 21 05 – fax: 44 21 07
e-mail: klement@post.olivant.fo

# Kappróðrabátarnir

8-mannafarið »Oyndri« og 5-mannafarið »Bylgjan« verða hervið lýstir til sølu.

**Áhuga ringi á tlf. 444370, 444539 ella 444918**

# Frá Arbeiðarafelagnum Hæddini

Ársaðalfundurin, sum varð lýstur at verða 22. februar 2003, er útsettur til 8. mars 2003.

**Arbeiðarafelagið Hæddin**

veitst tú ikki tað?